# Góða mamma, babba og Jákup Petur

| Hilda Christiansen | Sjúrður Christiansen | Jákup Petur Juul |
|---|---|---|
| 09. jan. 1934 07. juni 2006 | 04. sept. 1927 08. juli 2006 | 25. sept. 1979 12. sept. 2006 |





Ja, í ár eru jólini annarleiðis hjá okkum. Tey seinastu árini er familjan vaksin soleiðis, at vit hava verið ein meira við borið á jólum, á hvørjum ári. Tað hevur verið so hugnaligt, men í ár mangla tit trý, ja tit halda ikki jól hjá okkum í ár sum tit plagdu, men tit halda jól í himlinum í ár, og soleiðis verður tað frá nú av.

Fyrst fórt tú mamma - tað var so tungt og hart, frá einari løtu til aðra so vart tú vekk. Tú sum altíð vart har fyri okkum, altíð í góðum lag og skemtilig, og altíð klár við einum góðum bita, líka mikið nær vit komu og hvussu nógv vit vóru, so var altíð nokk av mati, og øllum góðum.

Babba - tað var so tungt hjá tær, at vera sjúkur og missa tín besta stuðul, tað orkaði tú ikki at bera. Tú legði árarnar inn tann dagin mamma fór. "Á sum eg sakni mammu tykkara," tað segði tú ofta, teir fáu dagarnir vit høvdu teg eftir her, har vit systkin royndu at hjálpa og vera um teg, alt sum vit kundu. Men bert ein mánað seinni, so fórt tú eisini, tú visti at tú fórt, tað segði tú við okkum á sjúkrahúsinum tað seinasta kvøldið vit vóru og vitjaðu teg. Vit vildu hava at tú bleivst her. Tú vildi bara sleppa til mammu.

Og góði Jákup Petur, tú fórt so tveir mánaðar seinni. Tað var og er so óveruligt fyri mær at tú ert farin. Tú komst sum eitt ljós og lýsti upp hjá okkum, men mest hjá Mary og Marnu, nú tað hevði verið so trist hjá teimum. Tú vart so góður við tær, og tókst tær so væl av Marnu og bleivst hennara pápi, hon elskaði teg og tú hana frá fyrsta degi av. Og tá so Dávur bleiv føddur var alt bara so gott, vit vóru so glað, um at tey vóru í góðum hondum hjá tær, tit høvdu ætlanir við livinum, ja vit øll gleddu okkum. Men soleiðis skuldi tað ikki verða.

Ein dag fáa vit at vita, hví tað skuldi verða so. Tað er so ómetaliga tungt at ganga jólunum á møti í ár, men eg veit at tit høvdu sagt, at vit skuldu hugna okkum og fáa tað besta burturúr, og tað fara vit at gera.

Vit skulu nokk vera um tey sum tit fóru frá, og hjálpa teimum.

Takk fyri góð minnir.

Vit síggjast.

*Vil bert takka tykkum fyri alt*
*Tit mær góðu við á lívsins veg.*
*Lærdu meg at virða øll og alt,*
*Og siga takk.*

*Takki fyri alt tit góðu mær,*
*Minnini frá barnaárunum,*
*søgur,sangir og várt Faðir vár*
*við songarstokk.*

*Takki tykkum fyri lívið her*
*Sum vit livdu saman her á jørð*
*Gleði men at síggja tykkum har.*
*Í himlinum*

**Óluva**

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jóhan Martin Johannesen** andaðist á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi mánadagin 18. desember, 81 ára gamal. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík í dag kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni hósdagin kl. 13.00. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jóhan Martin, kunna lata eina gávu til Tofta Ítróttafelag; konta í peningastovnunum.

**Hjarnar Johannesen, Vestmanna, sonur Sofus og Kirstin (Kjúrtin)**, andaðist mánadagin 18. desember, 4 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði sonur og beiggi okkara

**Hjarnar Johannesen**

Vestmanna

andaðist mándagin 18. des. 4 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*
**Kirstin, Sofus, Rókur og Ronja**

---

## Tilfar til vikuskiftisblaðið

Tilfar til seinasta blaðið fyri jól má vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 21. desember kl. 10.00

**Sosialurin**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at beiggi okkara

**Andrass Jensen**
búsitandi í Grimsby

andaðist mánadagin 11. desember 73 ára gamal.

Andrass Jensen varð kremeraður í gjár, 19 desember.

*Vegna tey avvarðandi*
**Tordis og Hákun**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at høgt elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Frede Benjaminsen**

Nes

andaðist mánadagin 18. des. 71 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni fríggjadagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Jacoba, Harry, Hedvig, Lisbeth og Maj-Britt v/familju**

Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans, kunnu ístaðin lata Fríðrikskirkjuni eina peningagávu

---

**Dagurin í morgin**

**21. desember. Tummasarmessa.** Lærusveinurin sum fekk navnið hin vantrúni. Halgisøgan sigur, at hann boðaði evangeliið í Indiu, og har er í hvussu so er eitt tummasarkirkjulið, sum hann sigst at hava stovnað.